Saltfiskur:

# Føroyingar og íslendingar fáa nógv betri prís enn norðmenn



Saltfiskur er ikki bara saltfiskur. Tað noyðast norðmenn at ásanna

**Norskir saltfiskaframleiðarar missa 200 miljónir krónur um árið, tí fiskavørurnar partvís verða seldar á marknaðunum, sum gjalda ringast. Saltfiskur úr Íslandi og Føroyum fær 20-25% hægri prís enn tann norski. Hetta veit Fiskeriforskning í Noregi at siga**

SALTFISKUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Nógvir saltfiskaframleiðarar eru í Føroyum, og millum kendastu virkini er virkið hjá Faroe Seafood á Toftum og Vaðhorn Seafood á Strondum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Saltfiskur er ein av týdningarmiklastu vørunum í norskum fiskiídnaði, og árliga útflytir Noreg tilsamans 30.000 tons av saltaðum toski.

Hóast hetta stóra útflutningsvirðið, vísa árligu kanningarnar hjá Fiskeriforskning, at lønsemið hjá norskum saltfiskaframleiðarum seinastu árini er vorðið ógvuliga vánaligt. Hinvegin veit stovnurin at siga, at úrslitið hjá íslendskum og føroyskum framleiðarum er nógv betur enn hjá teimum norsku.

### Fleiri orsøkir

Granskararnir, Bjørn Inge Bendiksen og Sjúrður Joensen, sum starvast hjá Fiskeriforskning, vísa á fleiri orsøkir sum gera, at norskur saltfiskur hevur so lágan prís.

- Ein orsøk er, at dygdin á fiskinum í Noregi er verri av skaðum frá reiðskapi og handfaring umborð á skipum, sigur Sjúrður Joensen.

Í Íslandi og Føroyum verða eisini hættir nýttir, sum gera fiskin meira trivaligan við størri vætuinnihaldi samanborið við fisk, sum verður virkaður á traditionellan hátt í Noregi.

Fiskeriforskning veit at siga, at saltfiskaídnaðurin í Føroyum burtur av brúkar maskinur við nálum, sum spræna saltlaka í kjøtið á fiskinum. Hetta gevur eina eina betri framleiðslu. Í Íslandi brúka teir eisini nálir til sprænging og kør fylt við saltlaka, sum fiskurin verður lagdur í.

- Hetta eru hættir, sum verða lítið nýttir í Noregi, sigur Sjúrður Joensen.

### Meira átiligur

Tað kann tykjast paradoksalt, at saltfiskur við meira vatni selir betri enn fiskur, sum er virkaður á traditionellan hátt við minni vætu, men líkt er til, at marknaðurin heldur vil hava føroysku-og íslendsku vørurnar.

- Kjøtið í fiskinum gerst meira trivaligt, fær ein ljósari lit og sær meira átiligt út. Jú, meira væta, merkir eisini størri inntøka, tí fiskavørurnar viga meira, vísir Sjúrður Joensen á.

Kanningar, sum Fiskeriforskning hevur gjørt, staðfesta eisini, at saltfiskur virkaður við sproytulaka gevur eina betri dygd enn fiskur, sum verður virkaður á traditionellan hátt.

### Betri fiskur

Framleiðarar í Íslandi og Føroyum hava eisini í størri mun lagt dent á at skilja fiskin eftir dygd soleiðis, at viðskiftafólkini vita, hvat tey keypa.

Í Noregi er hinvegin vanligt at blanda saman góðan og ringan fisk, og tað ger, at norskur saltfiskur hevur trupult við at standa seg í kappingini á marknaðum, sum eru bevístir um dygd, skrivar Fiskeriforskning.

# Altjóða kapping um skynsamar veiðihættir

**- Hvønn dag verða 55.000 tons av góðum fiski, sum ongastaðni koma til gagns, dripin á havinum, sigur Heimsnáttúrustovnurin, WWF, sum nú fer at lata virðislønir fyri skynsamar veiðihættir**

VEIÐIHÆTTIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

WWF, Heimsnáttúrustovnurin, bjóðar nú til eina kapping um skynsamar veiðihættir.

Orsøkin er, at fiskimenn um allan heim hvønn dag veiða fisk, sum teir ikki hava loyvi at veiða og føra til lands, eins og teir veiða fisk, sum teir ikki vilja hava. Tí enda velduga stórar nøgdir av góðum fiski hvønn dag nyttuleyst á havsins botni.

### Altjóða kapping

Nú fer so Heimsnáttúrustovnurin undir eina altjóða kapping, har vinningarnir eru reiður peningur.

Endamáld við hesum er at finna fram til skynsamar veiðihættir, soleiðis at minni fiskur doyr óneyðugt og fellur á botnin sum burturkast.

Sambært WWF doyggja eini 55.000 tons av góðum fiski hvønn dag, sum ongastaðni koma til gagns. Fiskurin verður tveittur um lúnningina og í havið aftur.

### Lata virðislønir

Høvuðsvirðislønin er 150.000 krónur, og haraftrat letur stovnurin tvær virðislønir, sum hvør er upp á 30.000 krónur

Virðislønirnar verða lætnar teimum loysnum, sum best og bíligast kunnu minka um nøgdina av óynsktari hjáveiði.



*Eisini í Føroyum kenna vit trupulleikarnar við hjáveiði, og eitt nú verður arbeitt við at gera eina rist til svartkjaftatrolini fyri at minka um hjáveiðina av upsa og toski, ið sum skilst er ein trupulleiki ávísar tíðir av árinum*

*Mynd: Røgvi Mouritsen*